## DAGSINS MEINING

# Samgongan misti meirilutan

Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin vunnu fólkatingsvalið. Úrslitið er eisini sera áhugavert verður tað mett sum ein nærum fullkomin veljarakanning. Tað er í veruleikanum ein dómur yvir samgonguna og ein týðulig ávaring til bæði Fólkaflokk og Sjálvstýrisflokk. Tað er eisini ein áváring til Tjóðveldisflokkin ætlar hann sær í Tinganes aftur.

Valúrslitið reisir spurningin, hvat Fólkaflokkurin hevur fingið burtur úr hesum samgonguskeiðnum. Hann er fangaður í polariseringini. Fullveldisfólkini eru farin til Tjóðveldisflokkin og samríkisfólkini í Sambandsflokkin. Tað setur spurningin, um flokkurin ikki átti at valt eina meira hóvliga loysn saman við eitt nú Javnaðarflokkinum frá byrjan.

Javnaðarflokkurin varð ov stuttur men helt borg og væl tað. Hann var bara 400 atkvøður aftanfyri Tjóðveldisflokkin. Jóannes Eidesgaard, sum misti sessin, fekk tó eitt sera gott persónligt val við nærum 4000 atkvøðum. Hetta gevur eisini eina ábending um, hvønn persón stórur partur av veljarunum sær sum komandi løgmansevni.

Var talan um løgtingsval, hevði samgongan mist meirilutan. Úrslitið er m.a. ein útpurring til Tjóðveldisflokkin, tí flokkurin ger einki við 24% einsamallur. Tað var væntandi, at hvør vongurin skuldi fáa hvør sín mann, men tað kom óvart á, at Sambandsflokkurin skuldi fáa so nógv. Tað er úrslit av lítið semjusøkjandi politikki Tjóðveldisfloksins. Hann ræðir veljararnar. Tað byggir ikki land og tað fær okkum ikki fram á sjálvstýrisleið. Tað fastlæsir støðuna. Tjóðveldisflokkurin hevur tí stóran part av skylduni av, at Sambandsflokkurin gjørdist so sterkur.

Valið er ein staðfesting av, at føroyingar framvegis ganga í tveimum bólkum, og soleingi man ikki kann finna eina loysn, ið sameinir fleiri føroyingar enn nú, koma vit stuttan vegin. Tað ber ikki til at gera nakra stóra loysn við eini helvt av føroyingum og eini aðrari ímóti. 70 til 80% av føroyingum mugu standa aftan fyri tað, sum man ger. Og tað merkir, at skal nøkur realistisk og virðilig loysn finnast í ríkisrættarliga spurninginum, so má hon fevna um tríggjar stórar flokkar. Tað merkir í veruleikanum, at tað er ringt fyri ikki at siga ógjørligt at fáa eina loysn uttan um Javnaðarflokkin, havandi í huga, at Sambandsflokkurin er partur av polariseringini, sum ger, at vit koma ikki víðari.

Fólkaflokkurin hevur fingið nakað at hugsa um. Roknast má við, at hann nú av álvara fer at hugsa um seg sjálvan, og tað merkir, at hansara markeringar í samgonguni fara at vera kraftigar. Eisini kann hugsast, at markeringarnar innanhýsis í Fólkaflokkinum verða kraftigar. Alt hetta týðir uppá, at vit fara at fáa eitt valstríð longu nú og inni í sjálvum landsstýrinum. Tað er ein trupulleiki. Og rímuliga avleiðingin av hesum átti at verið, at løgmaður umhugsaði møguleikan at skriva út val fyrr.

Sær man valið týsdagin sum eina fólkaatkvøðu um politikkin hjá samgonguni, so tapti hon.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Heimarøktin komin í álvarsliga støðu

**Sjúkrasystrafelag Føroya**
*Jana H. Dalsgaard, forkvinna*

Støðan, sum heimarøktin í Suðuroy er sera álvarslig, ikki minst fyri sjúklingin og Sjúkrasystrafelag Føroya góðtekur als ikki, at limir felagsins arbeiða undir slíkum umstøðum

**Tænastubilar til Heimarøktina**
Málið um tænastubilar til Heimarøktina er eitt gamalt mál. Við verkfallinum, ið var fyrst í nítiárunum, vunnu vit tey rættindi, at tað ikki longur skuldi standa í setanarskrivinum hjá heilsu- og heimasjúkrasystrum at tær skuldu hava egnan bil tøkan til arbeiðsbrúk. Undan verkfallinum var hetta eitt krav.

Nógv hevur síðani tá verið tosað og skrivað um hetta mál, uttan at tað hevur givið nakað úrslit.

**Uppgávan og ábyrgdin hjá arbeiðsgevara**
Fyrsta dagin ið undirritaða var til arbeiðis her á skrivstovuni ( 19.mars 2001) setti heimasjúkrasystir í Suðuroy seg í samband við meg og segði frá, at tær har suðuri ikki høvdu bil aftaná 1.okt. 2001.Grundgevingin var, at tær bókstavuliga ikki høvdu bil eftir henda dag.

Á nevndarfundi í Sjúkrasystrafelag Føroya nakrar dagar seinni varð málið tikið upp, og niðurstøðan varð, at SFF skuldi taka málið upp fyri allar Føroyar.

SFF hevur ta áskoðan, at tað er uppgávan hjá arbeiðsgevaranum at skipa so fyri, at sjúkrasystrarnar fáa tey arbeiðsamboð ið eru neyðug, harundir bilar.

SFF boðaði síðani (3. apr. 2001) skrivliga leiðaranum í Heimarøktini frá, at Heimasjúkrasystrar ikki høvdu egnan bil tøkan til arbeiðsbrúk eftir 1. okt 2001 Somuleiðis hevur SFF kunnað arbeiðsgevaran um serligu støðuna í Suðuroy.

Støðan í dag, aftaná nógv arbeiði og drúgvar samráðingar, er tann, at tað hevur eyðnast pørtunum, at "sannføra" Almanna og Heilsumálastýrið og Fíggjarmálastýrið um, at tað er arbeiðsgevarans uppgáva at syrgja fyri, at neyðug arbeiðsamboð eru til taks og at tað er ein góð íløga at keypa bilar. Teir fyrstu 8 bilarnir eru ein beinleiðis sparing fyri Heimarøktina, so tað er ikki lætt hjá Landsstýrismanninum ikki at taka av tilboðnum.

Hetta hevur so ført til, at pengar til fyrstu bilarnar eru settir á eykajáttanaruppskotið fyri okt. 2001. Nú er bert eftir at tað verður samtykt í Tinginum. Eftir teimum úttalilsum frá politikarum ið hava verið m.a. í Sjónvarpi Føroya verður málið samtykt.

Um tað verður samtykt í tinginum, sum vit vænta, er okkara mál í ár, rokkið, og um so verður, er tað at fegnast um. Semja var millum SFF og allar heilsu og heimasjúkrasystrar um, at okkara mál var, at fáa nakrar bilar í ár, tvs. at fáa gongd á málið, alt annað mettu vit vera órealistiskt.

SFF setti tí ikki bilarnar sum fráboðað 1.nov.2001 tí málið verður loyst, hetta var breið semja um, eisini sjúkrasystrarnar í Suðuroy eru samdar í tí, tí vit fara sjálvsagt ikki í verkfall tá ið málið verður loyst.

(nevnda freist varð longd frá 1.okt. til 1.nov, tí Heimarøktin og Almanna og Heilsumálastýrið høvdu brúk fyri tíð til at fyrireika málið)

**Ongir bilar í Suðuroy**
Trupulleikin í Suðuroy er tó sum nevnt tann, at Heimasjúkrasystrarnar hava bókstaviliga talað ikki bil longur. Tær hava strekt seg so langt sum tær kundu, men tann 5. nov. bar ikki til longur, tá var ongin bilur eftir. Her er ikki talan um verkfall, men ta einfalda orsøk, at heimasjúkrasystrarnar hava slitið sínar privatu bilar upp í arbeiðsgevarans tænastu.

SFF kunnaði sum nevnt fyri langari tíð síðani Leiðaran í Heimarøktini um hesi serligu viðurskifti í Suðuroy, men hetta málið er ikki loyst enn. SFF boðaði frá og heldur fast við, at tað er arbeiðsgevarans uppgáva at loysa henda trupulleika. SFF stuðlar fult út okkara limum í Suðuroy í stríðnum, tí vit meta, at tað er ein sjálvsagdur rættur at fáa 2 bilar so tær fáa røkjt sítt arbeiði.

Nú er fyrsta vikan við ongum bili farin. Har tað ber til ganga tær, men í flestu førum verður hýruvognur nýttur til arbeiðis.

Vit vóru mong við teimum, ið vórðu sera illa við, tá ið tvær súkklur vórðu sendar teimum suður frá Heimarøktini.

Hetta meta vit vera at halda okkum øll fyri gjøldur, hugsið tykkum at fara á súkklu úr Vági til Sumbiar ella av Tvøroyri til Sandvíkar í kavaroki?!!?. Harafturat er arbeiðsbyrðan hjá sjúkrasystrunum so stór frammanundan, at tað er ivaleysa trupult at røkja tær neyðugu uppgávurnar innanfyri ásettu tíðina við bili.

**Álvarslig støða**
Hetta er sera álvarslig støða fyri allar partar, ikki minst fyri sjúklingin. SFF hevur enn einaferð heitt á arbeiðsgevaran um sum skjótast at loysa málið. Tá ið arbeiðsgevarin ikki kann krevja at sjúkrasystrarnar hava egnan bil tøkan, má hann loysa málið á annan hátt. SFF hevur eisini boðað frá, at vit meta, at einasta loysn á málinum er, at Suðuroyggin fær tveir bilar beinan veg. Um hetta ikki verður gjørt, kann tað hava sera álvarsliga avleiðingar, í ringasta føri, at Heimarøktin í Suðuroy verður niðurløgd tí ongin heimasjúkrasystir er eftir, ein er júst farin úr starvi av somu orsøk og fleiri eru á veg. Hetta hevur bráskund. SFF hevur somuleiðis boðað arbeiðsgevaranum frá, at vit góðtaka als ikki, at limir okkara arbeiða undir slíkum korum.

Fundur var millum partarnar mikudagin, og tað fréttist at eitt svar kemur frá arbeiðsgevaranum týsdagin.

Um ikki ein loysn verður funnin skjótt, má SFF taka spurningin upp um tiltøk skulu setast í verk. Vónandi verður hetta ikki neyðugt.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Nyrup sleikir sárini

**Poul Nyrup Rasmussen satsaði og tapti stórt. Valið gjørdist ein svíðandi ósigur hjá stjórnarflokkinum. - Men vit koma aftur, segði fráfarandi forsætisráðharrin**

FÓLKATINGSVAL
*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*



*Poul Nyrup Rasmussen var týðiliga vónbrotin av ósigrinum. Nógv rokna ikki við, at hann verður sitandi leingi afturat sum formaður í Socialdemokratiska flokkinum*

Líka so gott sum lagið var á ferjuni Sjælland, har Vinstra helt til, líka ringt var lagið í gamla Landstingssalinum á Christiansborg. Í hølunum hjá Socialdemokratunum drukku tey gravøl í staðin fyri sjampagnu.

Har var einki at hátíðarhalda. Sosialdemokratiski flokkurin fekk ringasta valið síðani 1988, og eftir níggju ár inni á heitu stjórnarskrivstovunum noyðist flokkurin nú út í andstøðukuldan. Nyrup hevði trupult við at halda tárunum aftur, tá hann mátti ásanna, at flokkurin hevði fingið ein dyggan frammaná.

### Mistók seg

Nyrup vónaði at fáa gagn av viðrákinum í veljarakanningunum, tá hann skrivaði út valið. Danmark hevur havt rúkandi framgongd seinastu mongu árini og er í dag eitt samfelag, sum telist millum tey ríkastu í heiminum. Nyrup vónaði, at veljarin enn einaferð fór at løna stjórnini fyri førda politikkin.

Men hann mistók seg. Veljarin var troyttur av Nyrup og vildi síggja nýggj andlit og royna eina nýggja stjórn. So skjótt, Nyrup hevði skrivað út val, byrjaði flokkurin at klára seg illa í veljarakanningunum. Og hann kom ongantíð fyri seg aftur.

Valstríðið gekk illa, og tað eydnaðist ongantíð Nyrup at varpa ljós á allar trupulleikarnar, sum stjórnin veruliga hevur loyst og at koma við góðum boðum um loysnir á trupulleikum, sum enn ikki eru loystir. Andstøðan átti valstríðið og gjørdi av, hvørji evni skuldu á dagsskránna. Høvuðsevnið hjá andstøðuni var útlendingapolitikkur, og her stóð Sosialdemokratiski flokkurin seg ikki væl

Socialdemokratiski flokkurin gjørdi eina roynd at sannføra veljararnar um sín útlendingapolitikk men hetta miseydnaðist. Eftir hetta lá vegurin inn í Forsætisráðið opin hjá Anders Fogh Rasmussen og Vinstra, sum eisini førdu seg fram við at lova størri vælferð enn stjórnarflokkarnir kundu bjóða.

### Fer ikki frá

Poul Nyrup Rasmussen var týðiliga vónbrotin av valúrslitinum, tá hann helt røðu fyri floksfeløgunum á midnátt týskvøldið.

- Í einum flokki eru tað eins og í lívinum upp- og niðurtúrar, sorg og gleði. Soleiðis er politikkur, soleiðis er lívið, segði floksformaðurin, sum sjálvur varðveitti fólkatingssessin men mátti siga farvæl við 11 av floksfeløgunum í Fólkatinginum.

Har verður Poul Nyrup Rasmussen í øllum førum sitandi til næsta val, men spurningurin er, hvussu leingi hann verður sitandi í formanssessinum í flokkinum. Sjálvur lat hann ongan iva vera um, at hann heldur fram.

- Skuldi nakar spurt meg, um eg haldi fram sum formaður, so kann eg vátta, at svarið er eitt rungandi ja. Minst til: Vit koma aftur, segði formaðurin.

Men socialdemokratarnir vóru ikki meira enn lidnir at syngja slagsangin, tá ið fólk í krókunum byrjaðu at tosa um, hvør skal avloysa Poul Nyrup Rasmussen.

Nógvir eygleiðarar rokna ikki við, at hann fer at standa á odda fyri flokkunum, tá ið Fólkatingsval aftur er í hondum.

# Drotningin á høgravonginum

**Pia Kjærsgaard verður ofta rópt fyri drotningin í donskum politikki. Týsdagin var hon enn einaferð drotningin á valinum og staðfesti støðuna hjá sær í Fólkatinginum við at vinna 22 sessir.**

FÓLKATINGSVAL
*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*



*Pia Kjærsgaard gjørdist saman við Anders Fogh Rasmussen stóri sigursharrin á Fólkatingsvalinum við einari framgongd uppá 13 fólkatingssessir. Danski Fólkaflokkurin er nú triðstørst í Fólkatinginum*

Tað hevur gingið skjótt hjá heimahjálparanum Piu Kjærsgaard og Danska Fólkaflokkinum í donskum politikki. Hon stovnaði flokkin í 1995, tá ið hon saman við fleiri øðrum fór úr Frambursflokkinum. Við valið í 1998 vann hon níggju fólkatingssessir, og víðgongda valskráin tryggjaði henni týsdagin 13 sessir afturat.

Tað gekk sum eftir ánni hjá Danska Fólkaflokkinum. Hann setti dagsskránna í valstríðnum meira enn nakar annar flokkur við áhaldandi tosinum um flóttafólk og innflytarar.

- Vit settu dagsskránna, og hinir flokkarnir kundu ikki lata vera við at tosa um okkum. Annaðhvørt við at skýra okkum sum ræðslumynd ella sum tað øvugta, segði Pia Kjærsgaard.

Flokkurin er nú triðstørsti flokkur við 22 fólkatingslimum, og hon fer at krevja ávirkan hareftir. Hon styðjar Anders Fogh Rasmussen og einari borgarligari stjórn, men tað verður undir ongum umstøðum treytaleyst.

Flokkurin krevur beinharðan politikk settan í verk mótvegis flóttafólkum og innflytarum, og tað verður á hesum økinum, at hann fer at royna at fáa sum mest burturúr.

### Ræðast flokkin

Danski Fólkaflokkurin verður ofta skýrdur at vera ein tann mest høgravíðgongdi í Evropa, og tað eru nógv sum stúra fyri gongdini, nú hann situr so sterkur í Fólkatinginum. Flestallir flokkar vilja halda honum so langt burturi frá ávirkan sum gjørligt, men hesuferð verður tað trupult. Hon verður parlamentariska støðið undir einari borgarligari stjórn, og hevur longu boðað frá, at hon fer at koppa stjórnini, um flokkur hennara ikki fær ávirkan á førda politikkin.

Anders Fogh Rasmussen hevur tí neyvan annað í at velja enn at lata Danska Fólkaflokkin seta síni fingramerki á fleiri av hjartamálunum hjá flokkinum. Innflytarar stúra fyri gongdini, og útlendskir eygleiðarar hava eyguni eftir gongdini í Danmark.

Sjálv hevur Pia Kjærsgaard góðar vónir.

- Vit vita væl, hví vit hava fingu atkvøðurnar, og vit vita væl, at vit nú skulu syrgja fyri at herða útlendingapolitikkin, revsingina fyri harðskap og neyðtøku og virka fyri betri viðurskiftum hjá teimum gomlu, segði Pia Kjærsgaard - valdrotningin í Danmark.